HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN

Falkavegur 6, 2. hædd
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands
Tel. +298 35 64 00
Fax. + 298 35 64 01
E-mail: hfs@hfs.fo
www.hfs.fo

FOOD, VETERINARY AND ENVIRONMENTAL AGENCY

# Laborantar til Fiska- og Djórasjúku-kanningarstovuna

Á kanningarstovuni á Fiska- og Djórasjúkudeildini (F&DSD) eru tvey laborantstørv leys at søkja. Annað starvið er nýtt og innanfyri karmin av játtanini til "Basan av fiskasjúkum", og hitt starvið er sum avloysari í 1½ ár fyri laborant í farloyvi. Innihaldið er eins fyri bæði størvini.

**Arbeiðsuppgávurnar**
Fevna fyrst og fremst um sjúkugreining av fiski og djórum við nýtslu av molekylerbiologiskari tøkni, m.a. Real-Time RT-PCR, RT-PCR, Real-time PCR, PCR og Sekventering.

Harumframt skalt tú vera við í øllum øðrum kanningum, so sum kyknudyrking, IFAT-kanningar til staðfesting av ILA-virus, ELISA-kanning til staðfesting av BKD, og máting av cortisol og Na/K-ATPasu.

Eisini kann roknast við, at sýnistøka úti á alistøðum ella í okkara vátrúmi verður ein partur av arbeiðsuppgávuni.

Kanningarstovan hevur framkomin molekylerbiologisk greiningartól, og vit hava fyri stuttum keypt nýggj tól til immunohistokemiskar kanningar. Í sambandi við umbyggingina á Debesartrøð verða umstøðurnar á kanningarstovunum munandi betri.

**Faklig krøv**
- Útbúgving sum laborantur, bioanalytikari, laboratoriuteknikari ella samsvarandi.
- Royndir frá arbeiði við omanfyrinevndu tøkni
- EDV á brúkarastøði. Royndir við edv-skipanum til kanningarstovur sum t.d. LIMS er ein fyrimunur, eins og arbeiði við elektroniskum journalum

**Onnur krøv**
- Positiv/ur, góð samstarvsevni, vera umhyggin og nágreinilig/ur og skal kunna arbeiða málrættað og sjálvstøðugt
- Koyrikort til bil er eitt krav
- Tola broytingar í starvinum.

**Vit kunnu bjóða**
- Spennandi og fjølbroytt arbeiði
- Verða við í menningini av Fiska- og djórasjúkudeildini á stovninum
- Møguleikar fyri at menna teg í arbeiðnum, við skeiðsluttøku og aðrari eftirútbúgving.

**Annað**
Í sambandi við eftirlitsvitjanir kann roknast við, at arbeiðsdagarnir til tíðir kunnu gerast langir.

**Umsókn og setan**
- Størvini skulu setast skjótast gjørligt
- Umsókn við avritum av prógvi, eftirútbúgving, starvsroyndum og møguligum viðmælum skal verða stovninum í hendi í seinasta lagi mánadagin hin 10. apríl 2006.
- Lønin verður sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálaráðið, sí heimasíðuna hjá Lønardeildini, www.lnd.fo.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Debes H. Christiansen, molekylerbiolog, ella Peter S. Østergaard, deildarleiðara.

*F&DSD er skipað í eina eftirlitsdeild (F&DSE) og eina kanningarstovu(F&DSK).*
***F&DSE** umsitur djórasjúkulógarverkið, og høvuðsuppgávurnar eru málsviðgerð og eftirlit. Higartil hevur arbeiðið fyri tað mesta snúð seg um alivinnuna, men við nýggjum størvum á F&DSE verða súgdjór og fuglur eisini ein partur av arbeiðinum.*
***F&DSK** er tilvísingarkanningarstova fyri fiskasjúkur og tekur sær av sjúkugreining og yvirvøku sambært djórasjúkulóggávuni, serliga av ILA-vaksineraðum alifiski. Arbeitt verður við at menna og íverkseta sjúkugreiningar og sjúkustaðfestingar fyri súgdjór og fugl, herundir fuglakrím.*



## YFF - Yrkisfelagið hjá fíggjarstovnum í Føroyum

**Søkir skrivstovufólk til fyrisitingina at byrja 1. mai 2006 ella eftir nærri avtalu.**

**Starvið fevnir m.a. um:**
· vanligt skrivstovuarbeiði, bókhald og roknskap
· sáttmálarøkt & samráðingar
· samskifti við nevnd og limir
· at mynda felagið úteftir

**Umframt viðkomandi útbúgving er tað umráðandi at tú:**
hevur góð samstarvsevnir
kanst arbeiða sjálvstøðugt
ert kreativ/ur og visjoner/ur

Løn og arbeiðstíð eftir nærri avtalu.

**Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum v.m. skal sendast til:**

**YFF**
J.H. Schrøtersgøta 9
Postsmoga 225
FO-110 Tórshavn

Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi tann 18. apríl 2006.

Hevur tú spurningar til starvið, kanst tú ringja til YFF á tlf 321212 ella 521212.

Sosialurin 341800

**YFF er nýstovnað felag hvørs endamál er at røkja áhugamálini hjá SFS – Starvsfólkafelag Sparikassana og Elektron og YT – Yrkisfelagið Trygdin, ið umboðar starvsfólkini hjá Tryggingarfelagnum Føroyar og Føroya Lívstrygging. Limatalið er í løtuni um tey 400. Skrivstovan er í hølunum hjá Starvsmannafelagnum.**




# Starvslýsingar á www.portal.fo

Kostnaður: (um lýsingin eisini er í Sosialinum)

| | |
|---|---|
| 1 vika | kr. 500,- |
| 2 vikur | kr. 750,- |
| til freistin at søkja er úti: | kr. 1.000,- |

Kostnaður: (um lýsingin ikki er í Sosialinum)

| | |
|---|---|
| 1 vika | kr. 750,- |
| 2 vikur | kr. 1.000,- |
| til freistin at søkja er úti: | kr. 1.250,- |

**2 lýsingar = -20% í avsláttri**
**3 ella fleiri = -30% í avsláttri**

Sosialurin
tel 341800 · fax 341801
teldupostur: lysing@sosialurin.fo